





# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**PEUGEOT BOXER**
Árg 1996, Km 258000. Kr. 65000 – 2.5 Turbo Diesel. Prísurin er v/mvg.



**SEAT CORDOBA**
Árg 1999, Km 106000. Kr. 85.000 – 1.9 diesel. prísurin er v/mvg. Vælhildin vørubilur.



**AUDI A4**
Árg 1997, Km 134000. Kr. 112.000 – 1.6i. Sera vælhildin og í góðum standi.



MF228
**FORD ESCORT**
Árg 1997, Km 131000. Kr. 63000 – 1.8 Diesel. Sentrallás, servostýring, elspegl, sleipikrók, hita í forrútinum



**FORD FIESTA**
Árg 1996, Km 81000. Kr. 35000 – 1.3 Cl bensin, 3 hurðar, í góðum standi



**FORD MONDEO**
Árg 1998, Km 117000. Kr. 109.000 – 1.8 Tdi Aircon. aircondition, servostýring, elrútar, fjarstýrt sentrallás, heilársdekk



**FORD MONDEO**
Árg 2000, Km 71000. Kr. 139.000 – 1.8 Tdi Aircon. aircondition, servostýring, sleipikrók, sentrallás,heilársdekk



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 2000, Km 32.000. Kr. 118.000 – Aut.gear, fløguspælari, servostýring, elrútar, hita í setrum, fjarstýrt sentrallás



**FORD FOCUS**
Árg 2000, Km 49000. Kr. 132.000 – 1.6i stw.



**HONDA ACCORD**
Árg 1998, Km 66000. Kr. 105.000 – 1.8i sedan.



**MAZDA PREMACY VAN**
Árg 2002, Km 71000. Kr. 145000 – **Nú** Kr. 2.0 Tdi van. Centralás, aircondition, servostýring, píkadekk



**HYUNDAI ACCENT**
Árg 2002, Km 31000. Kr. 118000 – 1.5i. sum nýggjur, servostýring, sentrallás, elrútar, elspegl, fløguspælari, aircondition, heilársdekk, eykasett av sportfelgum



**FORD MONDEO**
Árg 1999, Km 89000. Kr. 125000 – 1.8 TD.servostýring, sentrallás, hita í setrum, elrútar, aircondition, heilársdekk, sýnaður 2003



**VW TRANSPORTER**
Árg 2001, Km 60000. Kr. 148000 – 2.4 Diesel. Prísurin er við mvg. Sentrallás, servistýring, í góðum standi



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 1999, Km 46000. Kr. 99.000 – 2.0i aut.gear. elrútar, elspegl, fjarstýrt sentrallás, leðursetur, fløguspælara, hundagittar, alufelgur



**DAEWOO NUBIRA**
Árg 1998, Km 82000. Kr. 69.000 – 2.0i stw. sleipikrók, servustyring, elspegl, elrútar



**FORD MONDEO**
Árg 1998, Km 48000. Kr. 128000 – 2.5i v6 Aircon. væl útgjørdur, heilársdekk, sýnaður 2003



**FORD ESCORT**
Árg 1995, Km 120000. Kr. 50.000 – 1.8 diesel. Væl hildin Ford Escort



**CITROÉN XANTIA**
Árg 1998, Km 142000. Kr. 118.000 – 1.9 TD. Sentrallás, servostýring, hitaí setrum , elspegl, væl hildin

Ford
P/f Wenzel
AKRANESGØTA 5 TEL 354500 FAX 354501
Opið mána- fríggjadag: 8-17, leygardag: 10-14
www.wenzel.fo



Sámal Jákup Hansen, Klaksvík:

# 18 ár við somu Michelin-dekkum

**Seinasta mánadag fekk Sámal Jákup Hansen í Klaksvík fýra nýggj dekk ókeypis frá Michelin og Dekksentrinum. Orsøkin var, at hann hevði koyrt í 18 ár við einum setti av Michelin vetrardekkum**



*Rúni Lindberg, leiðari á Dekksentrinum, handar her Sámal Jákupi bilin við nýggjum Michelin Maxi Ice vetrardekkum*

DEKK
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Til veturin í 1986 keypti skiparin á Dúgvuni, Sámal Jákup Hansen í Klaksvík, fýra nýggj Michelin M+S 100 vetrardekk. Dekkini vórðu sett á ein hálvtannað ára gamlan Mitsubishi Galant.

Tvey ár seinni, í 1988, keypir Sámal Jákup ein nýggja bil av sama slagi og brúkar somu vetrardekkini til tann bilin. Nú er bilurin vorðin 16 ára gamal og sær enn út sum nýggjur. Hann hevur koyrt við hesum somu vetrardekkunum, til nú hann fekk boðin nýggj vetardekk frá Micheilin og Dekksentrinum, sum nú umboða Michelin.

Mitsubishi bilurin hevur nú koyrt um 140.000 km og vetrardekkini munnu hava koyrt umleið 70-80.000 kilometrar í hesi tilsamans 18 árini. Leggjast kann afturat, at dekkini enn vóru væl nýtilig enn.

# Toyota Dyna aftur á marknaðinum

**Tað eru nú nøkur ár síðan vit sóu ein nýggjan Toyota Dyna um okkara leiðir. Teir hava heldur ikki verið á føroyska og danska marknaðinum seinnu árini.**
**Men nú eru teir so aftur at fáa hjá Reyni Service**



*Toyota Dyna hjá P/F Mariu Poulsen við nummarplatuni MP7. Bilurin bleiv leveraður við Ferrari-krana, sum lyftur 1775 kg innast og 680 kg úti á 6 metrum*
*Prísurin fyri bil og krana er kr. 518.000,- við mvg*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Toyota Dyna, ið eru kendir sum slitsterkir og haldgóðir arbeiðsbilar, eru nú afturíaftur komnir og taka upp kappingina á marknaðinum. Teir verða gjørdir í ymiskum útgávum og støddum til fleiri ymisk endamál.

P/F Maria Poulsen í Havn fekk tann fyrsta nýggja Dyna við Ferrari-krana, sum Reyni Service eisini umboða. Bilurin skal brúkast til at koyra hitaútgerð á arbeiðsplássini hjá rørleggjarunum. Kranin er væl egnaður til at lyfta ketlar o.t.

Talan er um ein Dyna L75.38 við 4,6 litur D-4D commomrail turbo dieselmotori við intercoolara og 147 hk. Standard útgerðin er t.d. ABS bremsuskipan, el-rútar, digitalur ferðskrivari, sentrallás og startsperra. Rattið kann stillast bæði í hædd og longd.

## Peugeot 307 størri diesel



Teir væl umtóktu Peugeot 307, við 2,0 litur HDI turbo dieselmotori við 100 hk, verða nú munandi kvikari, tá teir fáa 136 hk. Toppferðin verður um 200 km/t, og teir verða 12-15 prosent kvikari

*Kelda: Motor Magasinet*

## Cadillac í Trollhättan



Tað gongur munandi betur at selja evropeiskar bilar í USA enn at selja amerikanskar bilar í Evropa. Tað fara General Motors, sum eiga Saab, nú at gera nakað við. Ætlanin er at framleiða Cadillac bilar í Trollhättan í Svøríki - bygdar yvir sama plattform sum Saab 9-3

*Kelda: Motor Magasinet*

## Saab framleiðast í USA



Meðan GM hava ætlanir um at framleiða Cadillac í Svøríki, er eisini ein onnur ætlan frammi um at framleiða Saab í USA fyri at spara flutningsútreiðslur

*Kelda: Motor Magasinet*